Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	23. august 2023
Mál nr.:	23/02452-54
Málsviðgjørt:	JND
Ummælistíð:	02.-30. mai 2023
Eftirkannað:	21.08.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin)

(Javning av framhaldandi árligari veiting av endurgjaldi fyri mist vinnuføri, áseting um, at endurgjaldsveiting í seinasta lagi endar við fólkapensjónsaldur, og ymsar tøkniligar broytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 8. mai 2012 og løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1, § 4, § 11, stk. 1 og § 15, stk. 1 verður "smbr." broytt til: "sbr.".

2. Í § 25, stk. 1, 1. pkt., § 28, stk. 4, 1. og 2. pkt., § 37, stk. 3, 1. og 2. pkt., § 44, stk. 1, 1. og 3. pkt., § 52, stk. 2, 2. pkt. og § 72, stk. 2, 2. pkt. verður "sbr. § 21, stk. 4" broytt til: "sbr. § 21, stk. 7".

3. Í § 31, stk. 2 verður "kunngerðini um vinnusjúkur" broytt til: "kunngerðini, sum gjørd er við heimild í § 10, stk. 2".

4. Í § 38, nr. 1, í yvirskriftini undir Kapittul 9, í § 44, stk. 2, § 48, stk. 1, § 56, stk. 1 og í yvirskriftini undir Kapittul 15 verður "v.m." broytt til: "o.a.".

5. Í § 43, stk. 3 verður aftan á "tikin" sett: ", sbr. tó stk. 4".

6. Í § 43 verður sum stk. 4 sett: "*Stk 4.* Endurgjald, ið verður veitt sum framhaldandi árlig veiting sbrt. § 50, verður javnað av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum eftir somu reglum sum ásett í stk. 1 og 2."

7. Í § 46, stk. 1 og 2 verður "dagpeningalógini" broytt til: "løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m."

8. Í § 50 verður stk. 3 orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Framhaldandi endurgjaldsveitingin heldur uppat seinast í mánaðinum, tá tryggjaði nær fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., og tryggjaði fær tá í staðin eitt endaligt endurgjald fyri mist vinnuføri, ið svarar til tvær ferðir ta árligu endurgjaldsveitingina eftir § 49. Hevur tryggjaði longu nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., tá avgerðin um at veita honum endurgjald fyri mist vinnuføri verður tikin, verður endaliga veitingin somuleiðis tvær ferðir árliga gjaldið, roknað sbrt. § 49."

9. Í § 50 verður sum stk. 4 sett: "*Stk. 4.* Endurgjald fyri mist vinnuføri, ið verður veitt sum framhaldandi árlig veiting sbrt. stk. 1, verður javnað sbrt. § 43, stk. 4."

10. Í § 52, stk. 1 og í § 72, stk. 1 verður "lógini um tænastumannaeftirløn" broytt til: "løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir".

11. Í § 52, stk. 2 og í § 72, stk. 2 verður "lógin um tænastumannaeftirløn" broytt til: "løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir".

12. § 66 verður orðað soleiðis:

"**§ 66.** Endurgjaldið fyri miss av uppihaldara heldur uppat seinast í tí mánaðinum, at tann, ið hevur rætt til veitingina, nær fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., og veitt verður tá eitt endaligt endurgjald, ið samsvarar við tvær ferðir tað árliga endurgjaldið sambært § 64, stk. 1. Sama er galdandi, um viðkomandi, ið hevur rætt til veitingina, longu hevði rætt til fólkapensjón sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., tá tryggjaði læt lív orsakað av arbeiðsskaðanum ella av vinnusjúkuni sbrt. § 10, stk. 1."

13. Í § 81, stk. 1 verður "lógini" broytt til: "løgtingslóg".

14. Í yvirskriftini undir Kapittul 18 verður "Gildiskoma-" broytt til: "Gildiskoma".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Endurgjøld, ið verða veitt sum framhaldandi árlig veiting sbrt. § 50, verða fyrstu ferð javnað, fyrstu ferð endurgjaldsupphæddirnar sbrt. § 43 verða javnaðar eftir gildiskomudagin sbrt. stk. 1.
Stk. 3. Løgtingslógin er galdandi fyri øll endurgjøld, ið verða veitt sum framhaldandi árlig veiting sbrt. § 50, eftir at løgtingslógin kom í gildi, uttan mun til, nær endurgjaldið er tillutað. Endurgjøld, sum eru tillutað, áðrenn løgtingslógin kom í gildi, verða fyrstu ferð javnað við útgangsstøði í teirri upphædd, sum áður hevur verið útgoldin.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Borgarar og fakfeløg hava gjørt vart við, at endurgjald fyri mist vinnuføri, ið verður veitt sum framhaldandi árlig endurgjaldsveiting sambært § 50 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, ikki verður javnað í mun til lønarvøksturin í samfelagnum. Av tí sama minkar realvirðið á endurgjaldsveitingini, so hvørt sum lønirnar í samfelagnum hækka.

1.2. Galdandi lóggáva

Javning av upphæddum

Sambært § 43, stk. 1 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini verða ávísar upphæddir í løgtingslógini javnaðar av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum við broytingini í tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og avrundaðar til nærmastu 100 kr. Talan er um upphæddirnar, sum eru ásettar í §§ 42, stk. 6, 57, stk. 2 og 59, stk. 1.

Endurgjald fyri mist vinnuføri verður ásett við grundarlag í árslønini hjá tryggjaða. Árslønin er samlaða arbeiðsinntøkan hjá tí tryggjaða árið frammanundan arbeiðsskaðan, tó við einum ovara marki ásettum í § 42, stk. 6. Tá løgtingslógin kom í gildi 01.01.2010 var hámarkið fyri árslønina 367.000 kr. Hámarkið fyri árslønina verður javnað sambært § 43, stk. 1 og er nú 470.900 kr.

At endurgjaldsupphæddirnar sambært §§ 42, 57 og 59 verða javnaðar sambært § 43, stk. 1 merkir, at tær varðveita sítt realvirði í mun til lønarlagið í samfelagnum. Sama er ikki galdandi fyri endurgjald fyri mist vinnuføri sambært § 50, sum verður veitt sum framhaldandi árlig veiting.

Endurgjald fyri mist vinnuføri sambært § 50 verður roknað í mun til árslønina hjá tí tryggjaða sambært § 42, men eftir tað verður veitingin ikki javnað. Hetta merkir, at endurgjaldsveitingin missir realvirðið, so hvørt lønarlagið í samfelagnum hækkar. Um ein løntakari missir vinnuføri á ungum aldri, kann minkingin í realvirðinum av endurgjaldsveitingini vera munandi.

Í einum hugsaðum dømi fær ein borgari í 2011 tillutaða framhaldandi árliga endurgjaldsveiting sambært § 50 við 180.000 kr. í árligum útgjaldi. Í 2022 er árliga útgjaldið sambært galdandi løgtingslóg framvegis 180.000 kr. Í sama tíðarskeiði – frá 2011 til 2022 – eru endurgjaldsupphæddirnar, sum eru ásettar í §§ 42, 57 og 59, og sum eru javnaðar sambært § 43, stk. 1, hækkaðar við tilsamans 22.8%[1].

Hevði veitingin í hugsaða døminum omanfyri verið javnað sambært § 43, stk. 1 á sama hátt sum endurgjaldsupphæddirnar sambært §§ 42, 57 og 59, so hevði framhaldandi árliga endurgjaldsveitingin, sum í 2011 var 180.000 kr., í 2022 verið 220.993 kr. Um framhaldandi árliga endurgjaldsveitingin í hugsaða døminum varð javnað øll árini sambært § 43, stk. 1, hevði árliga útgjaldið í 2022 sostatt verið 40.993 kr. hægri, enn tað var í 2011. Fyri alt tíðarskeiðið 2011-2022 hevði útgoldna veitingin í hugsaða døminum, um hon var javnað sambært § 43, stk. 1, verið 263.535 kr. hægri, enn hon hevði verið sambært galdandi løgtingslóg.

67 ára aldursmarkið í Arbeiðsskaðatryggingarlógini

[1] Kelda: Heimasíðan hjá Vanlukkutryggingarráðnum, sí fylgiskjal 10.

Sambært Arbeiðsskaðatryggingarlógini halda summar av veitingunum sambært løgtingslógini uppat seinast í tí mánaðinum, at tann, ið hevur rætt til veitingarnar, fyllir 67 ár. Aldursmarkið var upprunaliga tað sama sum pensjónsaldurin.

Í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. er ásett, at pensjónsaldurin er 67½ ár fyri persónar føddir í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962, og 68 ár fyri persónar føddir eftir 31. desember 1962.

Til tess at forða fyri, at persónar við arbeiðsskaða ella vinnusjúku, í eitt tíðarskeið, hvørki hava rætt til arbeiðsskaðatrygging ella fólkapensjón, eigur aldursmarkið í Arbeiðsskaðatryggingarlógini at fylgja fólkapensjónsaldrinum sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at skipa so fyri, at endurgjald fyri mist vinnuføri, ið verður veitt sum framhaldandi árlig endurgjaldsveiting sambært § 50, verður javnað í mun til lønarvøksturin í samfelagnum á sama hátt, sum aðrar upphæddir í løgtingslógini verða javnaðar. Á hendan hátt varðveitir veitingin sítt realvirði í mun til lønarlagið í samfelagnum.

Endamálið við lógaruppskotinum er harumframt at tryggja, at persónar við arbeiðsskaða ella vinnusjúku altíð hava rætt til antin arbeiðsskaðatrygging ella fólkapensjón.

Hóast hetta ikki er sjálvt endamálið við uppskotinum, verður høvi nýtt til at gera nakrar tøkniligar dagføringar av løgtingslógini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður ásett, at endurgjald fyri mist vinnuføri, ið verður veitt sum framhaldandi árlig endurgjaldsveiting sambært § 50, verður javnað av landsstýrinum eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum við broytingini í tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag avrundað til nærmastu 100 kr. Endurgjaldið verður hereftir javnað á hvørjum ári, soleiðis at veitingin ikki stendur í stað, men fylgir lønarvøkstrinum.

Aldursmarkið fyri, nær framhaldandi árlig endurgjaldsveiting fyri mist vinnuføri og framhaldandi tíðaravmarkað endurgjaldsveiting fyri mistan uppihaldara í seinasta lagi enda, verður broytt frá “67 ár” til “fólkapensjónsaldur sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a.”.

Við uppskotinum verða eisini gjørdar ein rað av tøkniligum rættingum og dagføringum, sum ikki ávirka løgfrøðiliga virknaðin av løgtingslógini.

1.5. Ummæli

Hesi hava fingið uppskotið til ummælis:

- Akademikarafelag Føroya
- Almanna- og mentamálaráðið
- Betri Trygging
- Bioanalytikarafelagið

- Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
- Ergoterapeutfelagið
- Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum
- Felag Tænastumanna Landsins
- Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
- Felagið Maskinmeistaralærarar
- Fíggjarmálaráðið
- Føroya Arbeiðarafelag
- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Føroya Fiskimannafelag
- Føroya Handverkarafelag
- Føroya Lærarafelag
- Føroya Pedagogfelag
- Føroya Skipara- og navigatørfelag
- Føroya Tekniska Lærarafelag
- Føroya Vanlukkutryggingarráð
- Fysioterapeutfelag Føroya
- Havnar Arbeiðskvinnufelag
- Heilsuhjálparafelag Føroya
- Heilsurøktarafelagið
- Hjálparlæknaráð Føroya
- Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
- Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag
- Kommunala Arbeiðagevarafelagið
- Kommunulæknafelag Føroya
- Kost- og føðslufelagið
- Landsfelag Handverkaranna
- Leikarafelag Føroya
- LÍV
- Ljósmøðrafelag Føroya
- Maskinmeistarafelagið
- Musikklærarafelag Føroya
- Prestafelag Føroya
- Samtak
- Samverk
- Serlæknafelag Føroya
- Starvsfelagið
- Tannlæknafelagið
- Trygd
- Vinnuhúsið
- Yrkisfelagið Miðnám
- YTF (Yrkisfelag hjá tryggingarfeløgum, fíggjarstovnum og KT-fyritøkum)

Uppskotið hevur harafturat ligið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

Ummæli komu frá Føroya Fiskimannafelag, Almanna- og mentamálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, Føroya Vanlukkutryggingarráð, Trygd, Betri Trygging, Føroya Arbeiðsgevarafelag og frá Fakfelagssamstarvinum.

Føroya Fiskimannafelag tekur undir við uppskotinum.

Almanna- og mentamálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og *Føroya Arbeiðsgevarfelag* hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

Føroya Vanlukkutryggingarráð heldur, at framhaldandi tíðaravmarkað veiting fyri miss av uppihaldara sambært § 64 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini eigur at verða javnað á sama hátt, sum framhaldandi árlig veiting fyri mist vinnuføri sambært § 50 verður javnað sambært uppskotinum.
Spurningin er viðgjørdur í sambandi við fyrireikingina av løgtingslógaruppskotinum. Veitingin sambært § 64 er til eftirsitandi, sum hava mist uppihaldara. Veitingin svarar til 30% av árslønini hjá tí deyða og kann í mesta lagi verða veitt í 10 ár. Talan er um eina veiting, ið er at rokna sum ein stuðul í eini skiftistíð, inntil eftirsitandi hava tillagað seg broyttu fortreytirnar eftir miss av uppihaldara. Mett verður ikki, at sami tørvur er á, at henda veitingin verður javnað, sum at framhaldandi árliga vetingin verður javnað. Hildið verður tí fast í upprunauppskotinum, hesum viðvíkjandi.

Trygd "viðurkennir endamálið við løgtingslógaruppskotinum, ið tryggjar eina rættvísa veiting til tann tryggjaða í tráð við bæði galdandi pensjónsaldur og lønarlagið í samfelagnum."

Trygd mælir til at broyta eina orðing í § 66 í uppskotinum, soleiðis at ivi ikki stendst um, hvussu leingi tryggjaði hevur rætt til framhaldandi árliga veiting.
Tikið verður undir við tilmælinum, og uppskotið er tillagað samsvarandi.

Trygd mælir til at strika regluna í §§ 50 og 66 um, at endaliga útgjaldið áðrenn fólkapensjónsaldur skal vera 2 ferðir árligu endurgjaldsveitingina eftir § 49.
Mett verður at talan her er um eina prinsippiella broyting, sum krevur gjølligari politiska viðgerð og samskifti við viðkomandi partar. Fyri ikki at seinka meginbroytingini um javning av framhaldandi árligari endurgjaldsveiting, sum er høvuðsendamálið við hesum uppskotinum, er avgjørt, ikki at fylgja tilmælinum hjá Trygd í hesum umfari. Tilmælið verður tó havt í huga í sambandi við komandi dagføring av Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Trygd viðmerkir, at broytingin, umframt hækkandi endurgjøld, eisini fer at merkja "meirkostnað í sambandi við umsiting, tá tryggingarmál við uppskotinum koma at vera undir viðgerð í longri tíðarskeið enn áður."
Mett verður, at allur meirkostnaður hjá tryggingarfeløgunum, orsakað av uppskotinum, fer at hava við sær hækkað tryggingargjøld. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið eru hækkandi tryggingargjøld nevnd sum ein møgulig avleiðing av lógaruppskotinum.

Trygd nýtir høvið til at vísa tvey onnur viðurskifti, sum Trygd heldur áttu at at verið eftirhugd og broytt í sambandi við hesa lógabroytingina. Í fyrra lagi heldur Trygd, at møguleiki skuldi verið fyri at mótrokna inntøku frá vardum starvi í endurgjaldinum, og vísa tey í hesum sambandi til § 17 í Lov om arbejdsskadesikring. Í øðrum lagi mælir Trygd til, vísandi til § 17 a í Lov om arbejdsskadesikring, at broyta § 29 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini soleiðis, at ítøkilig freist verður sett fyri, nær niðurstøða um endurgjaldsveiting fyri viðurkendan arbeiðsskaða skal fyriliggja, og at krav verður sett um skriviliga kunning og grundgeving frá Vanlukkutryggingarráðnum, um ásetta freistin ikki kann haldast.

Mett verður, at talan her er um prinsippiellar broytingar, sum krevja gjølligari politiska viðgerð og samskifti við viðkomandi partar. Fyri ikki at seinka meginbroytingini um javning av framhaldandi árligari endurgjaldsveiting, sum er høvuðsendamálið við hesum uppskotinum, er avgjørt, ikki at fylgja tilmælinum hjá Trygd í hesum umfari. Tilmælið verður tó havt í huga í sambandi við komandi dagføring av Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Betri Trygging gleðist um, at stig verða tikin til at javnseta framhaldandi endurgjaldsveitingar við aðrar endurgjaldsveitingar.

Betri trygging metir, at Arbeiðsskaðatryggingarlógin sum heild átti at verið gjøgnumgingin og dagførd, soleiðis at "hon samsvarar mest møguligt við ta donsku lógina og fylgir teimum broytingum, ið har hava verið gjørdar gjøgnum árini, sum liður í samfelagsmenningini." Serliga verður mælt til, at ein áseting svarandi til ásetingina í § 17 a í donsku arbeiðsskaðalógini, sum viðvíkur áseting av mistum vinnuføri grundað á inntøku áðrenn arbeiðsskaða og ávikavist arbeiðsloysisveiting og inntøku í fleksjob, verður sett í Arbeiðsskaðatryggingarlógina. Eisini mælir Betri Trygging til, at møguligt skal vera at mótrokna í almannaveitingum í mun til veiting av mistum vinnuføri. Betri Trygging mælir eisini til, at tørvur er á "ásetingum um freistir fyri, nær avgerð skal vera tikin, samsvarandi við § 16 í donsku lógini."
Mett verður, at talan her er um prinsippiellar broytingar, sum krevja gjølligari politiska viðgerð og samskifti við viðkomandi partar. Fyri ikki at seinka meginbroytingini um javning av framhaldandi árligari endurgjaldsveiting, sum er høvuðsendamálið við hesum uppskotinum, er avgjørt, ikki at fylgja tilmælinum hjá Betri Trygging í hesum umfari. Tilmælið verður tó havt í huga í sambandi við komandi dagføring av Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Betri Trygging mælir til at broyta eina orðing í § 66 í uppskotinum, soleiðis at ivi ikki stendst um, hvussu leingi tryggjaði hevur rætt til framhaldandi árliga veiting.
Tikið verður undir við tilmælinum, og uppskotið er tillagað samsvarandi.

Betri Trygging vísir á, at lógaruppskotið fer at hava við sær, at tørvur verður á at hækka tryggingargjøldini.
Í viðmerkingunum til lógaruppskotið eru hækkandi tryggingargjøld nevnd sum ein møgulig avleiðing av lógaruppskotinum.

Fakfelagssamstarvið tekur undir við uppskotinum, men mælir eisini til, at lógin verður broytt soleiðis, at útgjald av framhaldandi árligari endurgjaldsveiting, ið, sum nú er, byrjar, tá Vanlukkutryggingarráðið hevur tikið avgerð í máli um framhaldandi árliga endurgjaldsveiting, skal rindast afturvirkandi antin frá skaðadegi ella frá umsóknardegi.

Undir verandi skipan hevur borgari rætt til sjúkradagpening, um viðkomandi er óarbeiðsførur í eitt tíðarskeið vegna sjúku ella skaða, uttan mun til um sjúkan ella skaðin eru tongd at arbeiðnum hjá viðkomandi. Ikki fyrrenn tað er staðfest, at talan er um varandi arbeiðsskaða ella vinnusjúku, kemur endurgjald ella veiting eftir Arbeiðsskaðatryggingarlógini uppá tal.
Mett verður, at talan her er um prinsippiellar broytingar, sum krevja gjølligari politiska viðgerð og samskifti við viðkomandi partar. Fyri ikki at seinka meginbroytingini um javning av framhaldandi árligari endurgjaldsveiting, sum er høvuðsendamálið við hesum uppskotinum, er avgjørt, ikki at fylgja tilmælinum hjá Fakfelagssamstarvinum í hesum umfari. Tilmælið verður tó havt í huga í sambandi við komandi dagføring av Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Eftirkanning
Í sambandi við eftirkanning av løgtingslógaruppskotinum mælti Løgmálaráðið til, at ein rød av tøkniligum rættingum verða gjørdar, nú høvið er til tess. Tilmælið er tikið til eftirtektar, og løgtingslógaruppskotið er tillagað samsvarandi.

Eisini mælti Løgmálaráðið til at broyta § 2, stk. 1 í løgtingslógaruppskotinum. Tilmælið er tikið til eftirtektar, § 2, stk. 1 er stytt og nýtt stk. 2 sett inn.

Í sambandi við eftirkanning av løgtingslógaruppskotinum mælti Løgtingskrivstovan til at broyta "landsstýrismanninum" í § 43, stk. 4 til "landsstýrinum". Tilmælið er tikið til eftirtektar, og løgtingslógaruppskotið er tillagað samsvarandi. Umframt í § 43, stk. 4 er lógaruppskotið harumframt broytt soleiðis, at "landsstýrismaður" í ymsum bendingum verður broytt til "landsstýrið" í samsvarandi bendingum allastaðni í lógartekstinum.

Løgtingslógaruppskotið hevur verið til eftirkanning umaftur í Løgmálaráðnum, eftir at broytingar sambært teirra tilmæli og tilmælinum frá Løgtingsskrivstovuni vórðu settar inn í uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Tó er hugsandi, at tryggingarfeløgini, sum selja vanlukkutryggingar sambært Arbeiðsskaðatryggingarlógini, fara at hækka tryggingargjøldini nakað, orsakað av lógarbroytingini. Við tað, at kommunur sambært løgtingslógini hava skyldu at tekna tryggingar fyri síni starvsfólk, kann talan soleiðis gerast um eina økta útreiðslu fyri kommunur.

Landið hevur ikki skyldu til at tekna tryggingar fyri síni starvsfólk, men í tann mun landið er skyldugt at rinda endurgjald fyri mist vinnuføri, við framhaldandi árligari veiting, verður útreiðslan størri enn áður, við tað at upphæddin ikki longur, sum frá líður, fer at minka í realvirði og við tað, at útgjaldstíðarskeiðið verður longri.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Vanlukkutryggingarráðið ger tilmæli til landsstýrið um javning eftir nærri reglum í løgtingslógini, og uppgávan hjá landsstýrinum er at staðfesta tilmælið, sum Vanlukkutryggingarráðið síðani almannakunnger sambært áseting í løgtingslógini. Uppgávan hjá landsstýrinum verður sostatt óbroytt.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri tryggingarfeløgini, sum m.a. skulu rinda meira út í endurgjøldum, ið vera veitt sum framhaldandi árlig veiting. Tí er væntandi, at tryggingarfeløgini fara at hækka tryggingargjøldini nakað, orsakað av lógarbroytingini. Við tað at arbeiðsgevarar sambært løgtingslógini hava skyldu at tekna tryggingar fyri síni starvsfólk, kann talan soleiðis gerast um eina nakað økta útreiðslu fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið bøtir um viðurskiftini hjá teimum, ið fáa endurgjald fyri mist vinnuføri útgoldið sum framhaldandi árliga veiting. Áður hava hesi upplivað, at veitingin sum frá líður gerst minni og minni verd. Við broytingini verður veitingin javnað, soleiðis at hon hækkar í samsvari við lønarvøksturin í samfelagnum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Økið er fevnt av ILO sáttmála nr. 19 um javnviðgerð í sambandi við vanlukkutrygging og av Norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd. Uppskotið gongur ikki ímóti sáttmálunum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru viðkomandi fyri uppskotið, heldur ikki Hoyvíkssáttmálin, Evropeiski mannarættindasáttmálin ella Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og uppskotið ger eingi inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið ásetir ongar skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið ásetir eingi gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

§ 1. nr. 1
Tøknilig broyting. Ikki góðkenda styttingin "smbr." (fyri "samanber") verður broytt til góðkendu styttingina "sbr."

§ 1. nr. 2
Tøknilig broyting. Tá ið arbeiðsskaðatryggingarlógin varð broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 2015, vórðu nýggj stykkir sett í § 21. Aðrar greinir í lógini, ið vísa til § 21, vórðu ikki broyttar samsvarandi. Tað verður hervið rættað.

§ 1. nr. 3
Tøknilig broyting. "Kunngerð um vinnusjúkur" er ikki formligt heiti á kunngerð. Fyri at gera heilt greitt, hvørja kunngerð talan er um, verður sett inn tilvísing til kunngerðarheimildina í § 10, stk. 2 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

§ 1. nr. 4
Tøknilig broyting. Ikki góðkenda styttingin "v.m." ("við meira") verður flestastaðni í løgtingslógini broytt til góðkendu styttingina "o.a." ("og annað"). Rættingin verður ikki framd í § 81, stk. 1, tí talan er har um, at ikki góðkenda styttingin er brúkt í formliga heitinum á aðrari løgtingslóg.

§ 1, nr. 5
Í § 43, stk. 3 í løgtingslógini er ásett, at veitingarnar sambært løgtingslógini verða roknaðar við grundarlag í upphæddunum, ið eru galdandi, tá avgerðin um játtaðu veitingarnar verður tikin. Við hesum lógaruppskotinum verður hetta broytt, tá ið tað snýr seg um endurgjald fyri mist vinnuføri, sum verður veitt sum ein framhaldandi árlig veiting sambært § 50. Tí verður ein

broyting gjørd í § 43, stk. 3, soleiðis at víst verður til nýggja stykki 4, har ásett er, at framhaldandi árliga veitingin fyri mist vinnuføri verður javnað árliga.

§ 1, nr. 6
Broytingin ber í sær, at upphæddin, sum rindað verður persóni, ið fær framhaldandi árliga endurgjaldsveiting fyri mist vinnuføri sambært § 50, verður javnað á sama hátt, sum upphæddirnar sambært § 42, stk. 6, § 57, stk. 2 og § 59, stk. 1. Nevndu upphæddir verða javnaðar sambært § 43, stk. 1 av landsstýrinum, eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum, við broytingini í tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, avrundað til nærmastu 100 krónur.

Við uppskotinum verður framhaldandi árlig endurgjaldsveiting fyri mist vinnuføri javnað hvørt ár so leingi, sum tryggjaði hevur rætt til veitingina. Á henda hátt varðveitir árliga útgoldna endurgjaldsupphæddin fyri mist vinnuføri sítt realvirði í mun til lønarvøksturin í samfelagnum.

Endamálið við broytingini er at fyribyrgja, at árligt útgoldna endurgjaldsupphæddin minkar í realvirði samsvarandi prísvøkstrinum í samfelagnum. Broytingin hevur týdning fyri øll, sum fáa tillutað framhaldandi árliga endurgjaldsveiting fyri mist vinnuføri, og broytingin hevur serligan týdning fyri yngri fólk, sum skulu hava hesa veiting í nógv ár.

§ 1. nr. 7
Tøknilig broyting. Í staðin fyri "dagpeningalógini" verður formliga heitið "løgtingslóg um dagpening v.m." sett inn.

§ 1, nr. 8 og nr. 12
Broytingin snýr seg um at broyta aldursmarkið í §§ 50 og 66 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini frá "67 ár" til fólkapensjónsaldurin hjá tryggjaða sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Hetta verður gjørt, fyri at rættindir og skyldur, ið fylgja av Arbeiðsskaðatryggingarlógini, ikki halda uppat, fyrrenn persónar fáa rætt til fólkapensjón sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. er ásett, at pensjónsaldurin er 67½ ár fyri persónar føddir í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962, og 68 ár fyri persónar føddir eftir 31. desember 1962. Við at broyta aldursmarkið í Arbeiðsskaðatryggingarlógini til at fylgja fólkapensjónsaldrinum sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. verður fyribyrgt, at tað verður eitt tíðarbil, har persónar við arbeiðsskaða ella vinnusjúku hvørki fáa arbeiðsskaðatrygging ella fólkapensjón.

§ 1, nr. 9
Í § 50 verður nýtt stykki 4 gjørt, sum ásetur, at veitingin sambært § 50 verður javnað sambært § 43, stk. 4. Sí eisini viðmerkingarnar omanfyri til § 1, nr. 2.

§ 1. nr. 10 og 11
Tøkniligar broytingar. Í staðin fyri "lógini um tænastumannaeftirløn" og "lógin um tænastumannaeftirløn" verður formliga heitið "løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir" sett inn.

§ 1. nr. 13
Tøknilig broyting. Í staðin fyri "lógini" (um landsins almenna roknskaparhald v.m.) verður sett inn formliga heitið "løgtingslóg" (um landsins almenna roknskaparhald v.m.).

§ 1. nr. 14
Tøknilig broyting. Bindistrikan eftir orðið “Gildiskoma” verður strikað.

Til § 2
Broytingin kemur í gildi beinanvegin, sum løgtingslógin er lýst. Endurgjald fyri mist vinnuføri, ið verður veitt sum framhaldandi árlig veiting, verður javnað fyrstu ferð, fyrstu ferð endurgjaldsupphæddirnar sambært § 43 verða javnaðar, eftir at løgtingslógin er komin í gildi. Løgtingslógin er galdandi fyri øll endurgjøld, ið verða veitt sum framhaldandi árlig endurgjaldsveiting eftir at lógin kom í gildi, eisini tey, sum eru tillutað, áðrenn lógin kom í gildi. Endurgjøld sambært § 50, sum vóru tillutað, áðrenn lógin kom í gildi, verða javnað við útgangsstøði í teirri upphædd, sum varð útgoldin, áðrenn lógin kom í gildi.

Umhvørvismálaráðið, 23.08.2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælisskriv frá Føroya Fiskimannafelag
Fylgiskjal 3: Ummælisskriv frá Almanna- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 4: Ummælisskriv frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum
Fylgiskjal 5: Ummælisskriv frá Føroya Vanlukkutryggingarráð
Fylgiskjal 6: Ummælisskriv frá Trygd
Fylgiskjal 7: Ummælisskriv frá Betri Trygging
Fylgiskjal 8: Ummælisskriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 9: Ummælisskriv frá Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 10: Úrrit av heimasíðunum hjá Vanlukkutryggingarráðnum: Javning av upphæddum